SÚKKLUR

Súkklurnar hjá Justini, Samanthu og Peturi hava ymiskar støddir. Talvan niðanfyri vísir teinin, súkklurnar koyra fyri hvørja ferð, hjólini snara runt eina heila umferð.

	Teinur koyrdur í cm					
	1 umferð	2 umferðir	3 umferðir	4 umferðir	5 umferðir	6 umferðir
Petur	96	192	288	384	480	…
Samantha	160	320	480	640	800	…
Justin	190	380	570	760	950	…

Spurningur 1 SÚKKLUR

M810Q01

Petur súkklaði, so hjólini mólu tríggjar heilar ferðir runt. Um Justin gjørdi tað sama við síni súkklu, hvussu nógv longri hevði súkklan hjá Justin koyrt? Gev svarið í sentimetrum.

Svar: .....cm.

Spurningur 2 SÚKKLUR

M810Q02

Hvussu nógvar ferðir skulu hjólini á súkkluni hjá Samanthu mala runt fyri at koyra 1280 cm?

Svar: .....ferðir.

Spurningur 3: SÚKKLUR

M810Q03 - 00 11 12 21 99

Ummálið á hjólinum á súkkluni hjá Peturi er 96 cm (ella 0.96 m). Hon hevur trý gir: eitt lágt, eitt miðal og eitt høgt. Girlutfallini á súkklu hansara eru:

Lágt	3:1	Miðal	6:5	Høgt	1:2

Hvussu ofta skal Petur traðka pedalarnar runt fyri at koyra 960 m í miðal giri? Vís, hvussu tú kemur fram til úrslitið.

GEV GÆTUR: Girlutfallið 3:1 merkir, at tríggjar umferðir hjá pedalunum geva hjólinum eina umferð.